BLÁI STÓLURIN




## Sámal Bláhamar, ferðavinnumaður, 58 ár

# »Eg eri sera óruddiligur«

**Lýs teg sjálvan við trimum orðum:**
– Droymandi, skapandi og undangongufólk.

**Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?**
– Man burdi…

**Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?**
– Avgjørt hondunum, tí tær eru so sigandi.

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?**
– Fimtan minuttir. Eg leypi undir brúsuna, raki mær og busti tenn. Síðan eti eg ein góðan morgunmat, ið altíð er havragreytur ella rugbreyð og banan.

**Hvat stressar teg?**
– Tað, eg ikki megni at gera. Eitt nú eri eg sera óruddiligur og finni sjáldan tað, eg skal. Tað stressar meg almikið.

**Hvat gleðir teg?**
– Fyrst og fremst tá eg kenni meg væl, og familjan hevur tað gott. Somuleiðis gleðir tað meg, tá abbabørnini eru á vitjan.

**Nær feldi tú seinast eitt tár?**
– Fyri fýra vikum síðani feldi eg gleðitár, tá Svenning á Lofti hevði eina útvarpssamrøðu við ein toftamann.

**Nær smakkaði tú tær seinast á?**
– Á ólavsøku í 1997.

**Hvat var tað seinasta ynski, tú fekst útint?**
– Tá eg fór við einum bólki av tíðindafólkum til Barcelona at vitja ein ferðaleiðaraskúla. Tað var ein ótrúliga góð og gevandi ferð.

**Hvar arbeiðir tú?**
– Um summarið arbeiði eg í ferðavinnuni. Eg geri útferðir í Føroyum. Restina av árinum arbeiði eg við ENJO, ið eru reingerðaramboð, sum vaska uttan sápu og bert við vatni.

**Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at fáast við ferðavinnu?**
– At gera ferðavinnuna til ein lívsstíl. Um tú ætlar tær at arbeiða sjálvstøðugt innan hetta yrkið, nyttar ikki at arbeiða bert fyri pengarnar, tí arbeiðið tekur sera nógv tíð.

**Hvat er besta uppfinningin?**
– Hjólið, tí tað fær alt at mæla.

**Hvat hevur tú í lummunum beint nú?**
– Alt millum himmal og jørð.
– Eitt myndatól, tvey sett av brillum, fartelefon, pass, kúlupenn o.s.fr. Eg havi altíð nógv í lummunum.

**Hvat er títt besta heimaráð?**
– Ikki at roykja, ikki at drekka alkohol og at hugsa um, hvat vit eta.

**Hvør er stuttligast í Føroyum?**
– Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale. Fløgan, teir góvu út, var sera stuttligt. Teir fáa meg at flenna hart, tá teir í speisemi skemta við føroyska samfelagnum.

**Hvør er keðiligast í Føroyum?**
– Eg sjálvur, tá eg eri í ringum lag. Tá eri eg keðiligur!

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
– Um morgunin, tá eg havi verið í brús og turki mær.

**Hvussu ofta ert tú til frisør?**
– Eini fýra ferðir um árið. Tá klippi eg mær altíð stutt.

**Hvør er tín stuttligasta uppliving innan ferðavinnuna?**
– Eg havi upplivað nógvar stuttligar løtur í mínum starvi. Serliga er tað stuttligt, tá eg vísi ferðafólki Føroyar fram, og tey síðan fortelja mær, hvussu spennandi og vakurt tað er í Føroyum.

**Hvør er tín keðiligasta uppliving í tínum arbeiði?**
– Tá eg komi forseint. Tað hendir ikki ofta, men viðhvørt. Tað standa altíð nógv fólk og bíða eftir mær, og tá er tað sjálvandi keðiligt at skuffa tey.